UTTAN ÚR HEIMI

## Bumbaðu børn og kvinnur

Minst ellivu fólk doyðu, tá amerikanskir hermenn javnaðu eini hús norðan fyri Bagdad við jørðina í gjár, og sambært iraksku myndugleikunum vóru fleiri kvinnur og børn ímillum tey deyðu.

Amerikanararnir siga, at fýra fólk vóru í húsunum, og teir viðganga, at álopið kostaði einum barni og tveimum kvinnum lívið. Teir vilja eisini vera við, at hermenninir tóku ein mann, sum hevur verið uppi í uppreistrinum. Irakski løgregluovastin í Samarra, Laith Mohammed, sigur harafturímóti, at amerikonsk flogfør og stríðsvognar bumbaðu húsini, og at øll ellivu, sum vóru inni, doyðu. Við AP sigur hann, at tey flestu vóru kvinnur og børn, og at eingin í húsinum hevði nakað samband við uppreistrarmenninar.

Aftur í gjár vóru fleiri bumbuatsóknir í Irak, teirra millum ein sjálvmorðsatsókn. Minst fýra fólk doyðu, og nógv vórðu særd.

## Rúsevnahandil má steðgast

Afghanski politikarin Habibullah Qaderi vil hava altjóða samfelagið at hjálpa landsins myndugleikum at steðga teirri altsamt veksandi rúsevnasmuglingini úr Afghanistan.

Afghanski politikarin var í Wien í gjár, og í einari røðu har segði hann, at rúevnið er við at oyðileggja tilveruna hjá nógvum afghanum, samstundis sum tað er ein hóttan ímóti landsins trygd. Afghanska stjórnin er ikki før fyri at loysa trupulleikarnar, og tí má altjóða samfelagið hjálpa henni, segði Habibullah Qaderi.

Í røðuni segði hann, at hóast afghanska stjórnin roynir at forða bøndrunum at dyrka opium, verður framleiðslan munandi størri í ár enn í fjør, tí nógvir bøndur sýta fyri at laga seg eftir politikkinum hjá stjórnini. Afghanistan er tað landið í heiminum, sum útflytir mest opium.

## Irak-kanning í Týsklandi

Tað vakti stóran ans, tá tað herfyri kom fram, at týska fregnartænastan lat amerikanarunum týðandi upplýsingar um iraksku verjuna, beint áðrenn USA gjørdi innrás í landið.

Andstøðan í týska ríkisdegnum hevur kravt, at tíðindini verða kannað, og í gjár eydnaðist andstøðuni at noyða tingið at seta eina serliga nevnd at kanna málið. Týska grundlógin sigur, at ein fjórðingur av tinginum kann krevja eitt mál kannað. Tað kravdi undirtøku frá 154 tinglimum, og 157 umboð hjá Vinstraflokkinum, Teinum Grønu og Fría Demokratiska Flokkinum skrivaðu undir kravið. Tað vóru tó ikki allir tinglimirnir hjá teimum trimum flokkunum, sum skrivaðu undir. Joschka Fischer hjá Teimum Grønu, sum var uttanríkisráðharri undir Irak-innrásini, vildi ikki skriva undir kravið um eina kanningarnevnd. Tvørturímóti bardist hann sum úlvur á skóg ímóti kanningini, skrivar blaðið Die Welt.

Nevndin skal eisini kanna, um flogfør hjá CIA hava brúkt týskar flogvallir, tá tey hava flutt fangar til og úr Guantanamo, og um týsku myndugleikarnir vóru vitandi um tað.

## Stórt alment vinningsbýti

Svenski ríkiskassin ger kvetti av fyritøkum, sum hann eigur, ella sum hann eigur saman við øðrum.

Árið í fjør royndist væl hjá svenska vinnulívinum, og sambært nýggjum tølum høvdu fyritøkurnar, sum tað almenna eigur, ella sum tað eigur part í, 63,3 mia. svenskar kr í avlopi í 2005. Tað hevði við sær, at vinningsbýtrið hjá ríkiskassanum var næstan 10 milliardir krónur í fjør enn í 2004, skrivar Aftonbladet.

Millum fyritøkurnar, sum góvu mest í ríkiskassan, eru orkufelagið Vattenfall og veddingartænastan Svenska Spel, sum góvu ávikavist 6,0 og 4,6 milliardir krónur av sær, og ríkiskassin fekk 330 mió. kr. burtur úr rúsdrekkasøluni Systembolaget. Vinnumálaráðharrin, Thomas Östros, sigur, at vinningsbýtið frá teimum almennu fyritøkunum er við til at tryggja vælferðina í svenska samfelagnum.

Virðið á partabrøvunum hjá svenska ríkinum hækkaði 8,5 prosent í fjør, og á nýggjárinum vóru partabrøvini 133,9 milliardir krónur verd, skrivar Aftonbladet.

# Til reiðar at fara frá



*Ibrahim Jaafari, forsætisrá›harri*

*Irakska tjóðartingið helt í gjár sín fyrsta fund síðani valið fyri trimum mánaðum síðani, men fundurin bendi ikki á, at nøkur stjórn verður skipað í bræði. Ætlanin var, at sitandi forsætisráðharrin, Ibrahim Jaafari, skuldi halda fram, men í gjár segði hann, at hann er til reiðar at taka seg aftur. Sjálvur helt hann, at tað fer at taka í minsta lagi ein mánað at skipa stjórn. Amerikanararnir vilja hava tingið at skipa nýggja stjórn sum skjótast, tí hildið verður, at tað kann tálma tí blóðuga ófriðinum.*

# India verður sum Kina

**Heimsbankin væntar, at í 2040 verður indiski búskapurin tann triðstørsti í heiminum**

BÚSKAPUR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Heimsbankin væntar stóran búskaparvøkstur í landssynningspartinum av Asia í komandi árum, og sambært Praful Patel, deildarstjóra, er tað serliga India, sum fer at gera vart við seg.

– Í 2040 verður tann indiski búskapurin tann triðstørsti í heiminum aftan fyri USA og Kina, sigur Praful Patel við Aftenposten. Hann vil ikki siga, hvat av hinum báðum londunum verður tað fremra.

Patel, sum er stjóri í asiatisku deildini hjá Heimsbankanum, sigur, at tey seinastu árini eru nógvir indarar við góðari útbúgving farnir aftur til heimlandið at arbeiða. Eitt úrslit av tí er, at indiskar fyritøkur eru farnar at gera seg galdandi á altjóða marknaðinum.

– Fyri bara fáum árum síðani vóru indisku fyritøkurnar veitarar hjá stórum útlendskum fyritøkum, men í dag kappast tær við tær somu fyritøkurnar, sigur Praful Patel. Higartil hevur hetta serliga verið galdandi innan kunningartøkni, men deildarstjórin væntar, at vit fara at síggja ta somu gongdina innan klædnaídnaðin, heilivágsídnaðin og annan ídnað.

– Í fleiri ár hevur búskaparvøksturin í Kina ligið um tíggju prosent, meðan vøksturin í India hevur verið um seks prosent. Men innan fimm ár kemur tann indiski vøksturin eisinmi upp á tíggju prosent, sigur Praful Patel.

# Vænta støðuga rentu

**Norska hagstovan væntar, at rentustøðið verður rættiliga støðugt tey næstu árini**

RENTA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í Noregi gongur tað sum í fleiri øðrum vesturevropeiskum londum: Búskapurin er í menning, arbeiðsloysið minkar, og húsaprísurin hækkar. Í seinastuni hava summir búskaparfrøðingar ávarað um, at gongdin kann enda við, at búskapurin verður ovhitaður, og at rentan fer at hækka.



*Norska hagstovan væntar, at rentan fer at halda sær tey næstu trý árini*

Men norska hagstovan stúrir ikki fyri gongdini. Í einari meting um gongdina trý tey næstu árini skrivar hagstovan, at vøksturin í búskapinum fer at minka, so hann verður meiri støðugur ár um ár. Um rentuna sigur metingin, at hon fer helst at hækka umleið 0,75 prosentstig í ár, men at hon síðani fer at halda sær tey næstu trý árini.